miðvikan
Nr. 63 • 31. mars 2010
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Ziska Jacobsen:**

# Rópini frá teimum neyðstøddu gav nýggja megi



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**2. partur**

Í undanfarna partinum varð endurgivin frásøgnin hjá Erik Lassen, sum gevur lesaranum ein farra av, hvussu menn hava upplivað hesa hending. Ein kann undrast á, at tað yvirhøvur vóru so nógvir mans, sum hóraðu undan eftir fyrst at hava neyðhildið sær eina heila nátt. Síðan at koma í land og uppá bakkan, og aftaná tað tann langi teinur at ganga til hús.

Norðoya Forminnasavn hevur fingið til vega veðurmátingar har á leiðini hesar báðar lagnudagar 26. og 27. mars 1930. Mátingar vóru gjørdar í Grindavík, Vestmannaoyggjunum og Eyrarbakka fleiri ferðir um dagin.

Her sást, at hitin hevur ligið um frostmarkið og niður í 4 kuldastig. Tað hava verið kavaælingar, og ein slíkur hevur verið, tá skipið sigldi á. Skrásetingarnar vísa, at tað hevur verið upp til vindstyrki 9, 21-24 m/s í Vestmannaoyggjunum, men á Eyrabakka, sum er á leiðini, har Ernestina fór á land, var vindstyrkin 6, 11-14 m/s av landnyrðingi. Tað kunnu tó hava verið avvik mikllum mátingarnar. Lufttrýstið lá í øllum støðum um 1000 mb.

Hetta bendir ikki á, at tað hevur verið av mesta vindi og kulda, men kortini nóg mikið til, at tað hevur kenst sera kalt hjá monnunum í teirri støðu teir vóru í.

## Sjóforhoyrið

Tann 5. apríl, stutt eftir, at manningin var komin heim aftur varð sjóforhoyr á sýslumansskrivstovuni í Klaksvík.

Sjórætturin var mannaður soleiðis, at Norðoya sýslumaður var formaður, meðan Hans Erik Olsen og Johannes Jacobsen vóru sjórættarlimir.

Sjóforhoyrið er í síni heild prentað sum serprent og givið út av Norðoya Fornminnafelag. Tað fæst í bókahandlum.

Nærum allir av manningini vórðu avhoyrdir. Fyrstur at verða avhoyrdur varð skiparin Johan David Joensen, Dávur í Gerðum.

Skipið lá jú bakk, og ætlanin var at sigla inn móti landi og síðan at venda út aftur sum vanligt er, táið tað verður ligið bakk. Men tað gekk nógv skjótari móti landi enn skiparin roknaði við. Hann helt orsøkina vera streymurin móti landi, sum hann seinni hevði hoyrt var serliga harður hetta kvøldið.

Skiparin helt so, at tað var tíð at venda, og hann gav boð um at starta motorin. Men hetta var júst ov seint, og úrslitið kenna vit.

Her kann eisini verða skoytt uppí, at okkurt av Ernestinu kom heim til Føroya og er framvegis til.

Aftaná fyrsta partin í hesi røð varð eg gjørdur varur við, at Eli Eltør hevði ein krampa av skipinum heim við, og hann var í varðveitslu hjá abbasoni við sama navni í Havn.

Tað er hugsandi, at Eli hevur verið verið ein av teimum, sum dagin eftir fóru at hyggja eftir vrakinum. Hann kann so hava funnið krampan í einum vrakpetti og hevur tikið hann heim við sær.

## Útvarpssamrøða við Ziska Jacobsen 1971

Ziska dámdi ongantíð at tosa um hendingina við Ernestinu og so avgjørt ikki alment. Hetta var tað vanliga, tá menn høvdu verið úti fyri slíkum dramatiskum hendingum.

Tó er til skjals ein útvarpssamrøða, sum táverandi útvarpsmaðurin Árni Absalonsen hevði við hann 1971.

Tá var Ziska 71 ára gamal, og søgan um, hvussu hetta eydnaðist, er henda:

Árni var farin til Klaksvíkar at vitja. Har var hann farin til Eskild Norðbú at klippa sær. Eskild var sonur motorpassaran á Ernestinu, Poul Joensen, hvørs heilt serligu søgu vit eisini greiða frá í komandi parti.

Eskild spyr tá Árna, hví útvarpið ikki gjørdi eina samrøðu við Ziska um hendingina við Ernestinu. Árni svaraði, at Ziska var einki fyri at tosa um hesa hending. Hann visti, at Niels Juel Arge hevði roynt at fáa eina samrøðu við Ziska, men tað hevði ikki eydnast.

Tá helt Eskild, sum var væl skorin fyri tungubandinum, at hann hevði ofta tosað við Ziska um hetta. Hann ivaðist ikki í, at hann skuldi fingið Ziska at sagt útvarpinum frá hendingini.

Longu sama kvøld ringir Eskild til Árna, sum var staddur heima hjá foreldrunum í Klaksvík og sigur við hann: "Eg eri inni hjá Ziska, og hann hevur játtað at greiða frá tilburðinum."

Árni sigur, at tað var av berari tilvild, at hann hevði bandupptakara hjá sær. Tað vóru bert nakrir metrar millum húsini, og Árni var skjótur oman til Ziska. Men hann var púra ófyrireikaður, tí hann hevði ikki roknað við hesum.

Vit fara nú at endurgeva hesa samrøðuna nærum orðarætt. Vit fáa váttað ta myndina, vit hava av einari beskednari hetju. Einki reyp, kanska mótsatt. Her er tó ikki rættuliga alt við. Ziska fortaldi fyri Eskild, at tá hann hevði svomið í land av Ernestinu, var hann fullkomiliga lúgvaður og føldi seg ikki føran fyri at taka sær nakað til. Men tað, sum gav honum nýggja megi, var, tá ið hann hoyrdi rópini hjá sínum framvegis neyðstøddu feløgum umborð á sundurknústa skipinum.

Í samrøðuni greiðir Ziska fyrst frá, at hann var 13 ára gamal, tá hann fór til skips á fyrsta sinni.

Um hesa minniligu ferðina við Ernestinu sigur hann, at teir komu yvir á Suðurlandið fyrst í mars mánaða. Teir høvdu fyri tað mesta fiskað á Selvogsbankunum, men so hendir hetta tann 26. mars, at teir fara á land.

Tað serliga við hesi frásøgn er sjálvsagt, at her fáa vit hana frá sjálvum høvuðspersóninum, og hetta er sjálvsagt eisini kensluborið.

Útvarpið endursendi annars hesar báðar frásagnir júst 80 áradagin fyri hendingina seinasta fríggjadag. Men nú eru so báðar samrøðurnar aftur á prenti.

Endurgevingin er stórt sæð orðarøtt, sum Ziska greiddi frá henni.



*Á leiðini til bóndagarðin kom manningin framvið Selvogsvitan*



*Leivdirnar av bóndagarðinum, teir komu til*

**Vit geva Ziska orðið:**

Vit høvdu fiskað eitt sindur tann dagin, men lítið. Vit háløðu av og góvust at fiska fyri illveður.

Tað varð lagt inneftir. Tað var ligið inneftir, og tað var meira at kallað illveður. Tað var eitt ordiligt illveður, ja. Eg arbeiddi í lastini. Vit vóru nakrir mans í lastini. So var tað við eitt vekk, at tað varð rópt, at vit fóru á land. So fóru vit upp, vit sluppu uppaftur.

**Var tað myrkt tá?**

Tað var myrkt, ja. Tað var um 10 tíðina. Eg veit ikki: Tað gekst ikki væl at sleppa upp hjá nógvum. Eg veit ikki, hvussu allir sluppu upp aftur.

**Og tit sóu einki, hvussu tað sá út á landi?**

Nei, nei, tað var heilt myrkt og tjúkt í kavaroki tá og nakað nógvur vindur.

Eg fór so ongantíð